# Lossingarmenn til arbeiðis

**Um vikuskiftið fara Lossingarmenn at hava tvær konsertir, og í næstu viku kemur nýggj fløga frá teimum**

FLØGUÚTGÁVA
*Eyðun Klakstein*



Tónleikararnir, sum goyma seg aftan fyri navnið Lossingarmenn, eru Rógvi á Rógvu, Búi Dam, Leivur Thomsen og Hallur Johannesen. Tveir royndir tónleikarar saman við tveimum yngri monnum. Um vikuskiftið fara teir at hava tvær konsertir, har Eivør Pálsdóttir eisini verður við.

Leygarkvøldið klokkan 21.00 spæla Lossingarmenn í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, og sunnukvøldið kl. 20.00 spæla teir í Margarinfabrikkini í Havn.

Í næstu viku kemur nýggj fløga við Lossingarmonnum, og tónleikurin av hesi fløgu er fyri tað mesta improvisatiónstónleikur – jazzur og nakað av fólkatónleiki. Búi Dam hevur skrivað tað mesta av tónleikinum, men eisini Búi og Egi Dam hava skrivað hvør sítt lag. Á trimum løgum syngur Eivør Pálsdóttir, har av sálmurin Harra Gud títt dýra navn og æra, og hon fer eisini at framføra hesar sangir á konsertunum um vikuskiftið.

Lossingarmenn hava spælt nógv í summar, millum annað á Jazzfestivalinum, og teir ælta sær eisini uttanlands at spæla seinni.




# Krevja gjald fyri V&T-flytingar

Føroya Sparikassi hevur gjørt av at krevja eitt gjalda áljóðandi 4 kr. fyri hvørja flyting umvegis V&T. Sparikassin fer undir hetta frá 1. januar 2003 at rokna. Gjaldið fyri flytingarnar verður skuldskrivað á kreditorunum.

Miðskeiðis í komandi árið verður V&T-skipanin niðurløgd. Avloysarin er longu funnin og farin at virka – tann so nógv umtalaða GjaldSkipanin.

Nógvir kundar hjá Sparikassanum og øðrum peningastovnum eru longu farnir at nýta nýggju skipanina, men hóttanin um eina kunngerð, ið forbjóðar skipanini, vekjur framvegis ótta millum kundarnar og peningastovnarnar.

—HR




Veðrið Bilar Lýsingar Tíðindi Viðmerkingar Ítróttur Nøvn Skráir Tiltøk
Sosialurin

veitst tú ikki tað?
Sosialurin





*Nú skal flutningsstuðulin til fisk og fiskavørur takast upp til viðgerðar*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Fyrimunir og vansar við flutningsstuðli til fisk

**Nevnd er nú sett at viðgera flutningsstuðul til fisk og fiskavørur. Álit og tilmæli skal latast landsstýrismanninum í fiskivinnumálum í seinasta lagi, 1. desember 2002**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, hevur nú sett eina nevnd, sum skal skriva álit um stuðul til flutning av fiski og fiskavørum.

Málsetningarnir hjá nevndini eru tríggir í tali, og teir taka støði í orðaða fiskivinnupolitikkinum.

Í fyrsta lagi skal nevndin syrgja fyri, at beinleiðis rakstrarstuðul ikki verður latin. Í øðrum lagi skulu viðurskiftini við flutningi av fiski og fiskaúrdráttum skipast, og í triðja lagi skal bøtast um kappingarføri, eins og kappingin skal javnstillast.

Arbeiðssetningurin hjá nevndini er eisini í trimum pørtum.

Nevndin skal í fyrsta lagi kanna og staðfesta fyrimunir og vansar við verandi flutningsskipan. Í øðrum lagi skal hon kanna og lýsa aðrar alternativar loysnir og fremja neyðugar raðfestingar. Í triðja lagi skal nevndin skriva álit og leggja tilmæli um loysn við raðfestingum fyri landsstýrismannin til støðutakan.

## Hildibjartur formaður

Umboðini í nevndini, sum viðger flutningin av fiski og fiskavørum, eru Hildibjartur Johansen, sum umboðar Fiskimálastýrið og er formaður, Agnar Jensen, valdur av Føroya Ráfiskakeyparafelag, Ábraham Løkin, valdur av Føroya Ráfiskaseljarafelag og at enda, Ronnie Háfoss, sum er skrivari.

Nevndin, sum longu hevur havt tveir fundir, skal lata landsstýrismanninum álit og tilmæli í seinasta lagi, 1. desember 2002.



ALS 10 ár

Í sambandi við at 10 ár eru liðin, síðani ALS varð sett á stovn, verður skipað fyri almennum 10-ára haldi hósdagin 21. november. Øll eru vælkomin.

09.00 Morgunmatur
09.15 Stjórin á Arbeiðsloysisskipanini, Elisabeth O. Gaardbo, bjóðar vælkomin
09.20 Forkvinnan í stýrinum, Karin Kjølbro
09.35 Landsstýrismaðurin í arbeiðsmarknaðarmálum, Bjarni Djurholm
09.50 Framløga av føðingardagsútgávu av Skýrák, Annika Wardum Joensen
10.10 Kári Bæk: Duet fyri tvær violinir Sámal Petersen og Jón Festurstein spæla
10.20 Steðgur
10.40 Roknskapur, Ernst Jacobsen, fíggjar- og fyrisitingarleiðari
10.55 Hagtøl v.m., Elisabeth O. Gaardbo, stjóri
11.10 Maður er mans gaman (hugleiðingar yvir 90-árini uppá gott og ilt) Páll Danielsen, sjónleikari, lesur hugleiðingar eftir Oddvør Johansen
11.30 Samfelagsbúskapur og arbeiðsloysi, Herman Oskarsson, búskaparfrøðingur
11.50 Pallborðskjak. Umboð fyri m.a. partarnar á arbeiðsmarknaðinum og politisku myndugleikarnar
12.30 Ábit
Eivør Pálsdóttir syngur

ALS
Arbeiðsloysisskipanin • Postsmoga 3022 • FO-110 Tórshavn
Tel 349550 • Fax 349551 • als@als.fo • www.als.fo

TRYGDARÚTGERÐ
BJARGINGARÚTGERÐ
SLØKKIÚTGERÐ

TRYGDARÚTGERÐ
Trygdarhjálmar
Húgvur til hjálmar
Kvalitets trygdarskógvar
Ymisk hoyrivernd
Støvmaskur v.m.
Trygdarbrillur
Skiltir / Ferðslutalvur,
Alt innan avmerkingarútgerð
Hondreins
**Handskar til øll endamál !**

BJARGINGARÚTGERÐ
· Bjargingarbátar
· Bjargingarkransar
· Ljós og battarlir til bjargingarbeltir
· Neyðrakettir
· Hondbluss
· Pioner plastjollur - nógv model
· Leysamotorar - páhengsmotorara

SLØKKIÚTGERÐ
· Eldsløkkjarir
· Brandteppir
· Roykalarmar
· Brandslangur
· Spulislangur
· Koplingar og slangubond
· Vognar til brand og spulislangur
· Ymisk strálirør
· **Slangur til øll endamál !**

TILBOÐ

| | |
|---|---|
| Luksus termoketildraktir | kr. 598,- |
| Regndraktir 100% vatntættar | kr. 598,- |
| Trygdaskógvar ovan leður - uttan lissur | kr. 598,- |
| Hoyrivernd v/Fm-radio | kr. 798,- |

Kaj Andreasen & Co
Heilsøla · Smásøla · Umboð
Tel. 315600 - Fax 318008